# Kunningarskriv

Porkeris- og Vágs kommuna hava avgjørt at seta sína egnu Barnaverndartænastu á stovn, ið kemur at liggja undir Sosialu deild hjá Porkeris og Vágs Kommunu, ið húsast á kommunuskrivstovuni í Porkeri.

**Avgreiðslutíðirnar eru hesar:**

mánadag- tórsdag:.............9-12 & 13-16
onsdag:......................................... 13-18
fríggjadag ....................................... 9-13

Aðrar tíðir svarar vakttelefonin hjá barnaverndartænastuni á tlf. nr. 22 67 15.

**Suðuroyar Sunnara Barnaverndartænasta**

Við Á 8 950 Porkeri
Tlf 37 36 04- Tlf. 22 67 15
T-post: sosialadeild@email.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## SKATTALISTIN FYRI 2007

Skattalistin fyri Fuglafjarðar kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni hvønn gerandisdag frá kl. 10.00 – 15.00
**frá 07. januar – 21. januar 2009**

*Fuglafjørður, tann 5. januar 2009*

**Fuglafjarðar kommuna**



## Endurlýsing

Føroya Landsbókasavn søkir avloysara fyri bókavørð.

Sí www.flb.fo

**Føroya landsbókasavn**
J.C. Svabos gøta 16
Box 61 – 110 Tórshavn
www.flb.fo

# Eystur Kommuna

## Pedagogur søkist til Frítíðarskúlan í Gøtu

**Frítíðarskúlin søkir eftir** 1 pedagogi á 20 t. viku, at byrja 1. februar. (arbeiðstíðirnar eru seinnapartin)

Starvið í Frítíðarskúlanum er tíðaravmarkað frá 01. 02. 09 – 30. 06. 09

Frítíðarskúlin liggur í hugnaligum umhvørvi, nær við spælipláss og sandin, í Syðrugøtu.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barnið í bólkinum

**Vit ynskja av tær :**
- at tú er álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerðandisdag
- at tú vilt vera við at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og fylgir lønarstigunum frá 11 – 17.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hannu E. Olsen, leiðara á frítíðarskúlanum, fartlf. 771009. Skrivlig umsókn, við avritum av prógvum og ummælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23 január kl. 10. 00.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Frítíðarskúlan í Gøtu
Fyri oman Brúgv 3
FO – 513 Sýðrugøta

Bygdaráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

# Bilur til sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002



**Ring 284444**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Lektari í søgu á Fróðskaparsetri Føroya

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í søgu leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann ið sett/ur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í søgu á deildini.

**Starvsøki**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um at hava ábyrgd av útbúgvingini í søgu og at undirvísa.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving í søgu hava granskaraførleika á ph.d. stigi og undirvísingarroyndir. Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava granskað í føroyskari søgu.

Við umsóknini skulu umframt CV fylgja avrit í fýra eintøkum av vísindaligum avrikum, eins og umsøkjarar skulu lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

**Umsókn**
Umsóknarfreist er 16. januar 2009.

Starvið verður sett 1. apríl 2009.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, tlf. 352583, elinsj@setur.fo ella til rektaran, Jóan Pauli Joensen jopajo@setur.fo

Umsóknir við avriti av prógvum, ævisøgu (CV) v. m. skulu sendast til:

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo



Altíð tað nýggjasta
www. sosialurin.fo

## Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**